# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



*Frá 1. mai 2007 er Margret Mortensen sett í starv hjá Føroya Felag móti Krabbameini*

## Margret Mortensen í starv hjá Krabbameins-felagnum

TÍÐINDASKRIV

Føroya Felag móti Krabbameini hevur sett Margret Mortensen í starv á skrivstovu felagsins í hálva tíð og fyribils í eitt ár.

Margret Mortensen, sum er 47 ára gomul, er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur í 1983 og hevur onkologiska og intensiva eftirútbúgving. Hon hevur nógvar og drúgvar royndir innan krabbameinsøki, hevur síðan hon var útbúgvin sum sjúkrarøktarfrøðingur starvast innan hetta øki. Hevur starvast á krabbameinsdeild á Bispebjerg Hospital í tvey ár, frá 1985 á ymsum krabbameins deildum á Finsen, og var við til at flyta har frá til Ríkissjúkrahúsið, har hon síðan starvaðist á krabbameinsdeild til 1993. Síðan 1994 hevur hon starvast á onkologiskt ambulatorium á Landssjúkrahúsinum

Á skrivstovuni hjá Krabbameinsfelagnum fer Margret at taka sær av at ráðgeva krabbameinssjúklingum og avvarðandi teirra eins og at taka sær av øðrum uppgávum saman við Jansy Gaardlykke, sum síðan 1996 hevur starvast í felagnum sum dagligur leiðari. Virksemið í felagnum, sum telist millum størstu sjúklingafeløg í Føroyum, er ókt nógv seinnu árini. Felagið skipar javnan fyri skeiðum, ráðstevnum, fyrilestrum og undirvísing, og tað tekur eisini lut í nógvum fundarvirksemi, bæði í Føroyum og uttanlands. Virksemið í sjálvhjálparbólkunum í felagnum er somuleiðis stórt.

Margret Mortensen byrjar í starvinum í dag 1. mai. Felagið býður henni at vera hjartaliga vælkomna.

"Romantique – fjálgur hugni":

## Romantikkur í Vestmanna





*Týsdagin 1. mai læt Kirstin Johannesen í Vestmanna upp handilin »Romantique«, sum er ein handil við gávulutum og brúkslist*

*Myndir: Jens Kristian Vang*



Týsdagin 1. mai læt ein nýggjur handil upp í Vestmanna. Talan er um »Romantique«, sum er ein handil við gávulutum og brúkslist.

Tað er Kirstin Johannesen í Vestmanna, sum eigur og rekur »Romantique«. Kirstin sigur, at hon hevur lagt dent á at hava breitt og fjølbroytt úrval av gávulutum og brúkslist. Alt er í fjálgum og hugnaligum stíli. Eisini delikatessur sum t.d. ymisk sløg av te, sjokolátu og smúkkir eru at fáa. Hon selur t.d. meturvørur, gardintoy, dúkar, eins og kendu donsku »Oliver Furniture« møblarnar, sum Søren Rørbæk hevur designað.

Eftir at hava arbeitt 17 ár í Føroya Sparikassa í Vestmanna, segði Kirstin seg úr starvi fyri umleið trimum árum síðan, og hevur hon seinastu tvey árini arbeitt í einum útibarnagarði í Vestmanna.

Kirstin sigur, at hon í fleiri ár hevur havt ein dreym um ein slíkan handil, og tá hon nú fekk møguleika at leiga hesi hølini, tók hon av. Serliga tí at handilin liggur væl fyri á Toftavegi, har vanliga nógv ferðsla er. »Romantique« er har sum bakaríið »hjá Regin« var áður.

Handilin er opin soleiðis: Mánadag – fríggjadag kl. 12-17.30 og leygardag kl. 10-14.

**mg**

## Birger Møller listaskeið í Havn

**Í døgunum frá 11. til 17. mai heldur kendi danski listamálarin og fakbókarithøvundurin Birger Møller skeið í málningalist í Kongaøtu 7 í Havn**

LISTASKEIÐ

Í døgunum frá 11. til 17. mai heldur kendi danski listamálarin og fakbókarithøvundurin Birger Møller skeið í málningalist í Kongagøtu 7 í Havn.

Talan er um tvey skeið, skeið 1 og skeið 2. Skeið 1 (fyri byrjaðar) er frá 11.-13. mai, og skeið 2 (fyri víðarikomin) er frá 14.-17. mai.

Birger er útbúgvin á grafisku deildini á skúlanum fyri brúkslist og á kunstakademiinum í Warzawa. Hann hevur útgivið fakbøkurnar: Acrylmaleri. Gyldendal 1990, Gyldendals lærebog i maleteknikker. Gyldendal 2001 og Malebogen. Gyldendal 2006.

Birger Møller hevur seinastu 20 árini undirvíst í málningalist á ymiskum listaskúlum og seinastu 17 árini fast við Århus Kunstakademi. Birger Møller hevur í fleiri umførum verið í Føroyum og hildið skeið.

Áhugað kunnu tekna seg hjá Randi Gunnarsdóttir á tel. 266575.

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir